# Gospelkórið Vox í Fríðrikskirkjuni



Sunnudagin kl. 16 hevur gospelkórið Vox jólakonsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum. Vox er myndað av 26 ungum fólkum úr Heimamissiónini, og kórleiðari er Ásbjørn Berthelsen av Strondum.

Gospelkórið, sum tað fyrstu tíðina varð kallað Voices of Praise, hevur nú tilsamans fýra ár á baki, og hesi árini hevur kórið havt fleiri framførslur serliga í sambandi við ymisk tiltøk hjá Heimamissiónini. Vox syngur rytmiskan gospelsang, sum í samband við jólahátíðina, verður av tí meira friðarliga slagnum. Afturat sær hevur Vox nakrar góðar tónleikarar, sum vanliga plaga at spæla til konsertirnar hjá kórinum.

Á jólakonsertini verða flest føroyskir sangir framførdir, men onkur útlendskur verður innímillum. Umframt tað samlaða kórið verða eisini nakrar framførslur frá einstaklingum í kórinum.

Gospelkórið Vox bjóðar øllum hjartaliga vælkomnum á jólakonsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum sunnudagin kl. 16.

# Jólakonsert í Vesturkirkjuni



JÓLAKONSERT
*Tíðindaskriv*

G.H.M. Harmoniorkestur, Havnarkórið, Jóhannes Andreasen og Havnar Hornorkestur framføra tónlek á jólakonsertini í Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 16.00

Nú sunnudagin 16. desember kl 16.00 verður Vesturkirkjan karmur um jólakonsertina, sum er á hvørjum ári undan jólum.

Havnakórið undir leiðslu av Ólavi Hátún fer at syngja sangir, sum hoyra jólunum til. Harumframt fer kórið eisini at syngja brot úr endanum av Messias. Føstu gestirnir á jólakonsertum í Vesturkirkjuni, Havnar Hornorkestur undir leiðslu av Ova Olsen og G.H.M. Harmoniorkestur undir leiðslu av Martini Mouritsen verða eisini við í ár. G.H.M. fer m.a. at framføra Christmas Rejoicing. Úr skránni hjá Hornorkestrinum kan m.a. nevnast: White Christmas av Irving Berlin. Eisini verður soloframførsla við Jóhannes Andreasen, sum fer at framføra tónleik eftir J.S. Bach á flyglinum í kirkjuni.

Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking:

# Arbeiðsfólkið fær fyrst at vita um gongdina



*- Nøkur virkir hjá okkum hava eitt hampiligt yvirskot, meðan onnur kanska hava eitt undirskot, og tað kann verða skiftandi millum virkini, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking*

**– Men vit kunnu siga, at tað hevur gingið hampiligt í ár, sigur fíggjarstjórin, Leivur Michelsen.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Enn ber ikki til at fáa nakað ítøkiligt at vita um, hvussu gingist hevur hjá Føroya Fiskavirking í hesum árinum. Roknskaparárið er ikki álmanakkaárið, so neyvu tølini koma ikki á borðið fyrr enn í vár, tá ið úrslitið verður kunngjørt.

Í fjør hevði felagið 8 milj. krónur í yvirskoti, 10 milj. krónur í 1999 og í 1998, sum var nógv tað besta árið hjá felagnum, vóru 18 milj. krónur í yvirskoti.

## Arbeiðsfólkið fyrst

Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, sigur, at enn fer felagið ikki at kunna almenningin ítøkiliga um gongdina.

- Øll árini hava vit samlað arbeiðsfólkið undan jólum og takkað fyri árið, iðfarið er. Hevur okkurt verið at sagt, so hava vit fyrst latið tey fingið tað at vita. Tí fara vit ikki siga nakað ítøkiligt um gongdina, fyrr enn vit hava kunnað arbeiðsfólki um hetta.

Stjórin sigur, at soleiðis hevur hann altíð gjørt, og hetta er tann minsta virðingin, felagið kann vísa sínum arbeiðsfólki.

- Vit gera á sama hátt, tá ið vit hava eitt hvørt, sum fjølmiðlarnir verða kunnaðir um við tíðindaskrivi ella á tíðindafundi, sigur Meinhard.

## Hampiliga væl nøgdir

Í fjør hevði Føroya Fiskavirking eitt yvirskot uppá 8 milj. krónur. Í 1999 var talið 10 milj. krónur, og besta árið var 1998; tá hevði felagið 18 milj. krónur í yvirskoti.Leirvur Michelsen, fíggjarstjóri á Føroya Fiskavirking, vil heldur ikki siga nakað ítøkiligt um, hvussu gongdin hevur verið í ár, men hann vísir á, at tað hevur gingið hampiligt.

- Eg vil siga, at vit eru hampiliga væl nøgdir í ár uttan tó at nevna nøkur tøl.Hann váttar, at felagið framvegis hevur eitt yvirskot og spurdur, um tølini faraat líkjast onkrum av teimum áðurnevndu, heldur hann fyri, at tað fara tey møguliga.

Nú fáa vit so at síggja, hvussu út sær, tá ið tølini koma á borðið.

## Skiftandi gongd

Stjórin, Meinhard Jacobsen, sigur, at ymiskt er, hvussu gongdin er hjá teimum einstøku virkjunum í felagnum, og soleiðis hevur tað verið øll árini.- Men tey flestu koyra, sum hann tekur til.Hjá summum virkjum gongur væl okkurt ár og eitt sindur lakari okkurt annað ár. Hetta avhongur eitt nú av, hvat fiskaslag ella hvørja framleiðslu virkini hava lagt seg eftir, og hvussu støðan er viðvíkjandi júst hesum fiskaslagnum og marknaðinum.

Meinhard vísir á, at t.d. í heyst hevur verið trupult at fingið fatur á hýsu, tí taðvísir seg, at føroysk hýsuframleiðsla í heyst ikki hevur klárað seg nóg væl í kappingini við Bretland.

- So, nøkur virkir hjá okkum hava summi ár eitt hampiligt yvirskot, meðan onnur kanska hava eitt undirskot, og tað kann vera skiftandi millum virkini, sigur hann.

Stjórin skammast tó ikki við fiskaprísirnar í Føroyum.

- Hesir eru fult á hædd við prísirnar í okkara grannalondum, og vit kunnu bara vera fegnir um, at okkara framleiðsla klárar at verða við í kappingini.

## Yvir 100 milj. krónur í lønum

Á Føroya Fiskavirking arbeiða umleið 800 fólk tilsamans, og felagið rindar meira enn 100 milj. krónur í lønum um árið. Og soleiðis hevur verið í fleiri ár.

Spurdur, hvussu fólk støðast í fiskaframleiðsluni, vísir Meinhard á, at rættiliga støðugt arbeiði hevur verið á virkjunum kring landið, og tá er lættari hjá fólki at støðast.

- Í tíðum sum hesum við nógvum arbeiði, kann vera torført at meta um,hvussu støðuføst fólk eru í fiskaframleiðsluni. Tað síggja vit nokk ikki, fyrr enn arbeiði gerst meira óstøðugt. Hetta hava vit sæð áður, sigur Meinhard Jacobsen.



UTTAN ÚR HEIMI

# Vil hava bin Laden fyri ein altjóða dómstól



*Kofi Annan nevndi ikki bin Laden við navni, men tað var eingin ivi um, hvat hann sipaði til, tá hann umrøddi málið í Oslo*

*Mynd: reuter*

**ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, er ímóti amerikansku ætlanini um ein amerikanskan hernaðardómstól.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Kofi Annan nevndi ikki bin Laden við navni, men tað var eingin ivi um, hvat hann sipaði til, tá hann umrøddi málið í Oslo. ST-aðalskrivarin hevur verið í Noregi seinastu dagarnar í sambandi við, at hann og ST fingu friðarheiðursløn Nobels í ár.

Eftir at hava verið á fundi við Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra varð Kofi Annan spurdur, hvussu hann heldur, at málið ímóti bin Laden skal avgreiðast, verður hann tikin fangi.

Annan svaraði, at eftir hansara tykki hava altjóða dómstólarnir, sum vórðu skipaðir í sambandi við fólkamorðið í Rwanda og borgarakríggið í gamla Jugoslavia, virkað væl.

-Men eg havi kortini varhugan av, at yvirgangsmenninir koma fyri ein dómstól í einum ávísum landi, legði Kofi Annan afturat.

Hann fanst ikki at amerikansku ætlanunum um at seta yvirgangsmenn fyri hernaðardómstólar og vísti á, at í samtyktini hjá ST stendur bert, at tílíkir brotsmenn skulu fyri rættin.Og hetta er framvegis sjónarmiðið hjá ST.

-Tað er greitt, at amerikanararnir virka samsvarandi sínum lógum. Og tá ST hevur lagt dent, at hetta skal avgreiðast lógliga og sambært reglunum um mannarættindi, so haldi eg, at vit hava sagt, hvat slag av dómstólum vit hugsa okkum, segði ST-aðalskrivarin.

# Innflytarar skulu svørja trygdareið

**Fremmandafólk, sum flyta til Bretlands at búseta seg, skulu svørja, at tey verða nýggja heimlandinum lýðin.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Talan er ikki um eitt uppskot frá stjórnini hjá Tony Blair, men um eina nýggja frágreiðing við uppskotum, sum hava til endamáls at forða ófriði og mótsagnum millum tey ymsu fólkasløgini í Bretlandi.

Uppskotini eru fleiri, men uppskotið um at krevja, at fremmandafólk skulu svørja trygdareið, er tað mest víðgongda. Hendan mannagongd er kortini ikki heilt ókend, tí Kanada hevur longu hesa skipanina.

Tað er einki at ivast í, at kravið um trygdareið fer at fáa stóra mótstøðu. Nýggja uppskotið fer munandi longur enn tað, sum David Blunkett, innanríkisráðharri legði fram seinasta vikuskiftið, og sum elvdi til nógv orðaskifti.

Í teirri nýggju frágreiðingini verður eisini skotið upp, at tey fremmandu skulu leggja seg eftir at tosa enskt meira, enn tey gera í dag, og sagt verður, at myndugleikarnir eiga at reka ein meiri miðvísan politikk ímóti rasuskilnaði.

Farið varð undir at skriva frágreiðingina eftir teir ógvusligu samanbrestirnar í fleiri enskum býum í summar.

# Jólatónar í Ribarhúsi

Týskvøldið 18. desember fara tveir fuglfirðingar at syrgja fyri jólatónum í Gallarí Ribarhúsi í Fuglafirði.

Eyðun Larsen fer at spæla ljómborð og Johan Hentze horn. Teir fara at spæla ymiskan tónleik; einamest jólatónleik.

Teir fara at spæla týskvøldið frá klokkan 19.00.

# Læknafelagið nýggja nevnd

Læknafelag Føroya hevði leygardagin aðalfund, og her varð nýggj nevnd vald fyri felagið.

Hans Petur Nielsen var afturvaldur sum formaður, og afturat honum sita hesi í nevndini: Odmar Færø, yvirlækni, Hans Jákup Simonsen, yvirlækni, Kári Rasmussen, kommunulækni, Annika Olsen, kommunulækni, Jens Andreassen, deildarlækni, og Elinborg Mortensen, hjálparlækni.

# Vátur jóladansur

All That Rain fer at spæla til jóladans á Kambsdali leygarkvøldið. Tað er Gøtu Ítróttarfelag, sum skipar fyri hesum tiltaki.

Hetta er tíðin, tá nógvir útisetar leita heimaftur til Føroya, og tí er slíkt dansitiltak eisini ætlað teimum, sum koma heim hesa ársins tíð.

All That Rain hevur seinastu vikurnar spælt aftur til dans, eftir at teir lógu stillir í nakrar mánaðir, tá Jens Marni Hansen var farin úr bólkinum. Nú er tað vágamaðurin Hans Ravnsfjall, sum tekur sær av gittarspæli og sangi, og bólkurin hevur vant sera nógv við nýggju manningini.

Dansurin verður í ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið.







